## Góðir brúktir bilar

**Nissan Primera 1.8 bensin aircon** árg 2000, bláur, 4 hurðar — **129.000**

**Opel Vectra 1.6 4x4 bensin** árg 1989, bláur, 4 hurðar, km. 127.000 — **36.000**

**Nissan Almera 2.0 Diesel** árg 1999, vínreyður, 4 hurðar, km. 106.000 — **98.000**

**VW Golf 1.9 Diesel Vøruv.** árg 12/1996, hvítur, 5 hurðar, km. 140.000 — **59.000**

**Peugeot 307 2.0 110 HK** árg 2002, gulur, 5 hurðar, km. 70.000 — **179.000**

**Mazda E2200 Lastbilur** árg 1996, reyður, 2 hurðar, km. 69.000 — **69.000**

**Peugeot 406 Stc. 2.0 HDi** árg 2001, bláur, 5 hurðar, km. 50.000 — **179.000**

**Ford Focus 1.6 bensin** árg 1999, gráur, 4 hurðar, km. 52.000 — **115.000**

**Peugeot 406 Stc. 2.0 bensin** árg 2002, brúnligur, 5 hurðar, km. 39.000 — **179.000**

**Toyota Carina II 1.6** árg 1989, reyður, 4 hurðar, km. 258.000, *sýnaður mai 2004* — **35.000**

**Peugeot 406 1.8 bensin** árg 1997, grønur, 4 hurðar, km. 130.000 — **99.000**

**Toyota Carina II 1.6** árg 1989, reyður, 4 hurðar, km. 226.000, *sýnaður juli 2004* — **35.000**

**Opel Astra 2.0 DTI TD** árg 1999, bláur, 4 hurðar, km. 72.000 — **109.000**

**Citroen C2 bensin** árg 2003, svartur, 3 hurðar, km. 12.500 — **199.000**

**Opel Vectra 2.0 Di** árg 2000, reyður, 5 hurðar, km. 89.000 — *sum nýggjur* **149.000**

**Kia Sephia 1.5 GTX bensin** árg 1997, reyður, 4 hurðar, km. 139.000 — **65.000**

**Opel Astra 1.6 bensin** árg 2000, svartur, 5 hurðar — **89.000**

**Mazda 323 2.0 Diesel** árg 1998, hvítur, 4 hurðar, km. 78.500 — **95.000**

**Opel Vectra 2.0 DT, stc** árg 1997, svartur, 5 hurðar, km. 182.000 — **89.000**

**Hyundai Accent bensin Aircon** árg 2000, gráur, 4 hurðar — **59.000**

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.bilarge.fo

Sosialurin 341800

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 34 54 00



Okkum tørvar ein

**arbeiðsmann**

til fyrifallandi arbeiði í bakaríinum,
á goymsluni og útkoyring.

Hevur hetta tín
áhuga so ring ella skriva til:

**P/F Frants Restorff**
**Tórsgøta 13**
**Postsmoga 41**
**100 Tórshavn**
**Tlf.: 31 10 60**

**frants restorff**



## Sjálvsognar-stovnurin ALV

**Søkt verður eftir fyribilssettum skúlaleiðara til ALV-skúlan við Áir**

(Starvið er tíðaravmarkað til 1. aug. 2005)

**Arbeiðsuppgávurnar hjá skúlaleiðaranum:**
- At vera við til at endurskoða og skipa virksemið á skúlanum, samsvarandi viðtøkunum fyri stovnin.
- At hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni og virkseminum á skúlanum.
- At undirvísa 8 tímar um vikuna.

Í dag fevnir frálæran á skúlanum um 9. fl. fólkaskúlans og ein FHS- flokk.

**Førleikakrøv:**
- Lærarautbúgving.
- Góð leiðslu- og samstarvsevnir.
- Áhuga at arbeiða teimum arbeiðstarnaðu at frama.
- Førleika at útføra og menna ásett arbeiði.

**Vit bjóða:**
- Avbjóðandi uppbyggingararbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan.
- Tætt samstarv við ALV-stýrið.
- Fjøltáttað og sjálvstøðugt arbeiði.
- Skeiðmøguleikar.

**Løn og setanartreytir:**
- Starvið verður at seta skjótast tilber.
- Starvið hevur tilvísing til stýrið.
- Starvið er flokkað í lønarflokki 32.1/32.2, sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Áhugað kunna venda sær til Doris Hansen á tlf. 265266 ella Bartal Kass á tlf. 221310 fyri at fáa fleiri upplýsningar.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 27. oktober 2004 kl. 12.00.**
Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m. skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
**Boks 301**
**110 Tórshavn**

**brævbjálvin skal merkjast: "umsókn skúlaleiðari"**

*Endamálið við skúlanum er:*
*c) at skipa fyri endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunna fara til arbeiðis,*
*d) at skipa fyri fakligari útbúgving handaliga ella bókliga av arbeiðstarnaðum.*
*(Hetta er partur av endamálsorðing fyri ALV)*



**Sosialurin**
www.sosialurin.fo



VITUS BERING DANMARK

## ÚTBÚGVINGAR Í HORSENS



**Hevur hetta tín áhuga!**

**Útbúgvingar á donskum og enskum:**
- Byggetekniker
- Bygningskonstruktør
- Markedsføringsøkonom

**Útbúgvingar á donskum:**
- IT-Ingeniør
- Adgangskursus
- Maskiningeniør
- Eksportingeniør
- Bygningsingeniør
- Produktionsteknolog
- Value Chain Management
- Kort- og landmålingstekniker

Ungdómsútbúgvingar
Diplomútbúgvingar
Skeiðvirksemi

Í tíðarskeiðnum – 27.09.-23.10.2004 verður fulltrúi skúlans Johan Eli Ellendersen, staddur í Føroyum.

Ring og frætt nærri ella avtala ein fund
tlf.: +45 6010 0151 / +298 31 24 86
mail: jee@vitusbering.dk

VITUS BERING DENMARK
CENTER FOR VIDEREGÅENDE UDDANNELSE
STRANDPROMENADEN 4C
DK-8700 HORSENS
TEL. +45 7625 5000
FAX: +45 7625 5100
MAIL: VB@VITUSBERING.DK

www.vitusbering.dk



**GER KVETTI**

**Opel Astra 1600 bíliga til sølu**



**Árg 97 · km. 85.000**

**Bilurin er í sera góðum standi og sera økonomiskur í brúki.**

**Til sølu vegna flyting**

**Áhugaði vinarliga ringi á tel 44 30 80 ella 74 30 80, ella maila á gudny78@msn.com**


W W W . S O S I A L U R I N . F O



# Eitt høvi til hugna

**- Veitslurnar fyri støk er ein møguleiki til tey støku at fara út til ein góðan bita og at hugna sær. Tað er ikki altíð eins hugaligt at fara út aleinaður, og tískil kann ein tílík veitsla vera eitt gott høvi til at sleppa út og hugna sær, sigur ein av fyrireikarunum Dagbjørg Hjaltalin**


VEITSLA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*


Fyri triðju ferð verður skipað fyri veitslu fyri støkum. Hon verður 30. okt. við borðhaldi og dansi. Tað eru Dagbjørg Hjaltalin og Ólavur Groth, sum skipa fyri veitsluni.

Dagbjørg greiðir frá, at hon fekk hugskotið, tá hon var til eina tílíka veitlsu í Danmark fyri nøkrum árum síðani. Síðani spældi hon við tankan í eina tíð, inntil hon fann ein at skipa fyri tí saman við, sum hevði haft somu tankar.

– Endamálið er simpulten at geva teimum, ið sita einsamøll eitt høvi til at fara út at skemta og hugna sær, sigur hon.

Hon greiðir frá, at ein dama, sum hevði verið til veitsluna hjá teimum segði, at hon varð vorðin einkja fyri nógvum árum síðani og hevði ikki verið úti síðani tá Men hon lat so væl at veitsluni og segði, at hon hevði farið aftur, um tað so var dagin eftir.

– Tá ein er stakur, er ein ikki so ofta úti og etur ein góðan bita, tí hava vit gjørt av, at tey skulu fáa ein góðan bita til veitsluna við trimum rættum og síðani dans aftaná. Hetta kvøldið verður tað X-Rays ið spælir. Men samstundis fáa tey eisini høvi til at sita og práta við borðið og læra hvønn annan at kenna, greiðir Dagbjørg frá.

Veitslan fyri støk verður tann 30. oktober, og freistin at tekna seg er úti tann 21. oktober.



## Kvøðan til tey støku

Hesin sangurin varð yrktur til ta einu veitsluna

Lag: det var en lørdag aften..

*Tað var eitt leygarkvøldið, á sofuni eg sat*
*eg mentan vildi hava, servera á eitt fat.*
*Eg misti bæði nøs og munn, tá Eir hon taldi mær*
*at vit sum eru støk, ein part av mentanini var.*

*Ja nú vit skulu samlast, nú kan tað vera nokk*
*nú slutt at sita heima og keða seg sum pjokk.*
*Og ganga hvør í sínum lag og ikki tíma út*
*nógv hugnaligari tað er, um fleiri binda knút.*

*Vit eru ongin hóttan, tí samla eru vit*
*Øll undir einum taki, og eru ei sum tit.*
*Og eru pipar ditt og datt og føla okkum best*
*Tá líkasinnaðum vit eru saman við sum flest.*

*Tað vil nú altíð vera , so einsamalt og trist*
*at fara út at svinga, sum 3. hjul jú vist*
*Og um tú út at eta skalt, er borðið alt ov stórt*
*ja hvørja fer tú angrar, at tú út at eta fórt.*

*Ja best man tað tí vera, at heimahugna sær*
*sjálvt um tú ofta manglar, eitt annað deiligt lær.*
*Ein hond, eitt lær, ein muss, eitt klemm er altíð gott at fá*
*tað veist tú best, sum altíð heima sita eina má.*

*Her sita ymsar lagnur við borðið her í kvøld*
*og er tað ikki herligt - tí hetta er ein fjøld.*
*Sum hevur eittans endamál, at hugna sær sum best*
*sum støk vit duga líka væl, sum pør tey duga flest.*

*Tað eru bæði vansar og fyrimunir við*
*hjá okkum støku kroppum, sum sita lið um lið.*
*Vit hava ongan partnara at taka hensyn til*
*men hyggja, dansa, svinga líka nógv sum ein nú vil.*

*Vit skulu ikki hugsa um skeld og sjalusi*
*um hondin nemur rumpu, á tí tú dansar við.*
*Ei heldur um tú klappar einum lærið alt ov eymt*
*hvat hava vit, sum støk tað ikki herligt og so nemt.*

*Jú tað er gamansleikur, at sita her sum støk*
*og um vit flirta fjanta, ei skírd at vera svøk.*
*Tí øll í sama báti eru, sum nú sita her*
*og lat so hini skræða seg, tað okkum sama ger*

*Nú fara vit at hugna, ja hugna okkum øll*
*vit eru fleiri komin um dalar og um fjøll.*
*At halda okkum her á gleim, við álvara og skemt*
*sum kvøldið gongur, verður tað so stuttligt og so nemt.*

**EMD.2004**





FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026



**BILATORG**
**hvønn hósdag í Sosialinum**



Eisini er møguleiki at lýsa
við bilum á Portalinum

**Sosialurin**
Box 76 • 110 Tórshavn • Tel. 341 800 • Fax 341 801 • www.sosialurin.fo